# Fekk bóltin aftur úr Íslandi

**10 ára gamli Andrias, sum býr í Saltangará, fekk um dagarnar ein pakka úr Íslandi. Í pakkanum var ein bóltur, sum Andrias misti á sjógv í Føroyum fyri meira enn fimm árum síðan**

AFTURKOMIN
*Edvard Joensen*



*Andrias hevur nú fingið bóltin aftur, sum var burtur í meira enn 5 ár. Hann varð afturfunnin á Skagafirði vestarlaga á Norðurlandinum í Íslandi*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Saltangará:** Bólturin hjá tí nú 10 ára gamla Andriasi Troest Hansen úr Saltangará fór á sjógv fyri hálvumsætta ári síðan og varð burtur. Men nú er hann afturkomin. Av Norðurlandinum í Íslandi.

Tey vóru familjuútferð í Dali, tey hjá Andriasi. Og smádreingirnir spældu bólt, sum teir eru vanir. Ter brúktu bóltin hjá Andriasi, sum mamman hevði verið so fyrivarin at skriva navn og telefonnummar á, um han skuldi blivið burtur.

Men tað hjálpti bara einki, tá hann fór á sjógv í Dali og rak til havs, hildu tey.

Men fyri umleið einum mánað síðan ringdi telefonin hjá Andriasi og teimum. Úr Íslandi. Ein kona fortaldi teimum, at tey høvdu ein bólt, sum Andrias átti. Og tey vildu fegin senda bóltin aftur til Føroya.

Tað gingu nakrir dagar, so kom bólturin í einum pakka. Saman við einum korti, sum vísir, hvar hann er funnin og einum lokalblaði, har maðurin, sum fann hann, hevur greitt frá hesum bóltinum og einum øðrum, hann eisini hevur funnið á sama rekaplássi. Hesin seinni var tó íslendskur.

Pápi Andriasar, Hallur, greiðir frá, at tey ringdu úr Íslandi og søgdu frá hesum. Maðurin, sum eitur Ingólfur Sveinsson, er bóndi á Lágmúla, sum liggur á vestara armi á Skagafirði uppi á Norðurlandinum í Íslandi.

Hann hevði funnið hendan bóltin, men dugdi ikki beinanveg at finna fram til, hvaðani hann var. Tí bara fimm tøl vóru í telefonnummarinum, sum skrivað var á hann.

Tað er ikki fyrr enn væl eftir, at bólturin er farin á sjógv, at vit í Føroyu hava fingið sekscifrað telefon nummar.

Hallur sigur, at nú má hann fara at senda teimum á Lágmúla ein Sosial, nú bólturin eisini er komin í føroysku pressuna.

Andrias heldur alla hendingina vera sera stuttliga og væntar, at nú sleppur hann helst til Íslands at hitta mannin, sum fann honum bóltin aftur. Og tað heldur pápin eisini kundi kanska verið stuttligt. Í hvussu er ætlar hann at fáa samband við hesi fólkini, sum hava sent teimum hendan bóltin aftur, sum hevur verið burtur í hálvtsætta ár.




*Pílurin vísir, hvar bólturin hjá Andriasi rak upp á vestara armi á Skagafirði vestarlaga á Norðurlandinum í Íslandi*






# Føroyskt í fokus

**SMS fer næstu dagarnar at seta føroyskar vørur í miðdepilin, og alt húsið fer at bera brá av føroysku vikuni**

FØROYSK VIKA
*Stefan í Skorini*

SMS skipar komandi dagarnar fyri føroyskari viku í húsinum. Hetta tiltakið hevur verið fleiri ferðir fyrr, men ikki á hvørjum ári. Nú er so ætlanin, at tiltakið skal vera á skránni hvørt ár.

– Vit halda, at tað eru nógvar góðar føroyskar vørur á marknaðinum, og tí vilja vit geva teimum ein møguleika at koma sær fram, sigur Rógvi Róin, ið er marknaðarleiðari í SMS.

Talan er um vanligar gerandisvørur, sum vera sýndar fram á torginum, og hetta fer serliga at merkjast í Miklagarði, sum fer at hava tilboð uppá tær vørurnar.

– Slíkt tiltak hevur verið fyrr í SMS, men karmarnir hesuferð eru sum heild betri. Vit gera væl meira burturúr, og alt húsið fer at bera brá av føroysku vikuni. Básarnir eru nýggir, og fyritøkurnar hava gjørt sær ómak fyri at fáa tað at síggja vakurt út, sigur Rógvi Róin.

Við í føroysku vikuni eru fimm fyritøkur, og tær eru Kemilux, Føroya Bjór, Mjólkarvirkið, Fóm og Fiskasølan. Tær, ið framleiða matvørur, fara at bjóða smakkiroyndir av sínum vørum á torginum,

Rógvi Róin heldur, at tað er upplagt, at Miklagarður setir føroyskar vørur í miðdepilin, so at tær fáa eitt skump frameftir, tí Miklagarður er størsti handil av sínum slag í Føroyum.

SMS hevur ætlanir um at hava eina føroyska viku aftur í næsta ár, og tá skulu fleiri føroyskar framleiðslufyritøkur vera við.

Skipað verður fyri fleiri tiltøkum, meðan føroyska vikan er. Eitt nú vitjar Kári Cool á torginum fríggjadagin, og TrøllaPætur verður gestur leygardagin.





*Føroyska vikan læt alment upp mikumorgunin kl. 10, og næstu dagarnir fara at bera brá av, at føroyskar vørur eru í miðdeplinum*

*Myndir: Jens Kr. Vang*



# Sunnudagur við brúnna

**Sunnudag hava útróðrarmenninir, sum komnir eru norður um til várróðurin, frí. Teir hvíla seg**

VÁRRÓÐURIN
*Orð og myndir:*
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Tað er friður í havnini á Eiði í dag. Bátarnir liggja bundnir, og bara onkur hendinga maður er at síggja. Teir flestu eru farnir til hús ella liggja umborð og hvíla seg.

Bátarnir liggja bundnir við bryggjurnar. Í løgum hvør uttan á øðrum. Tað rýkur úr onkrum roykhanusi og har kennist matarroykur. Teir kóka sær døgurða. Onkur hevur seyðarhøvd, eftir luktinum at døma.

Teir hava okkurt smávegis at taka í, sum ikki hevur verið tíð at bøtt um, meðan róð hevur verið dagliga út alla vikuna.

Onkur gongur á dekkinum og hjálpir upp á rullurnar í snellunum. Onkur annar hevur hongt sær koyggjuklæðini til turkingar. Tað er helst ikki so galið at fáa luftað út eisini í hesum dýrdarveðrinum í dag. Ella teir gera dergur. Tað skal eisini gerast, og júst nú er gott høvi til tað.

Meðan aðrir bara liggja á liðini og lurta eftir Útvarpinum. Okkurt forvitnisligt er at hoyra ein sovorðnan dag. Teir hava tað við at taka gamlar upptøkur fram aftur soleiðs av og á. Og tað kann eisini vera forvitnisligt.

